## DAGSINS MEINING

# Um ikki føroysk so donsk tilbúgving

Útvarpið visti í vikuni at siga frá, at oljufeløgini, sum skulu til at bora eftir olju í summar, eru so smátt farin at ótolnast eftir MRCC-tilbúgvingarskipanini. Er skipanin ikki farin at virka 1. apríl verður eingin oljuboring í summar. Oljufeløgini biðið um fund við Jørgen Niclassen, landsstýrismann, ið hevur ábyrgdina av tilbúgvingini. Landsstýrismaðurin vil tó áðrenn fundin tryggja sær, at samgongan veruliga er á einum máli um, hvussu málið skal loysast sum best. Fundurin í landsstýrinum er í dag.

Umrødda MRCC-støð skal samskipa leiting og bjarging á havinum. Og áðrenn ein oljuleiting fer í gongd skal slík tænasta verða tøk. Hetta hevur verið eitt afturvendandi mál í øllum oljutjakinum og hevur sum so verið ein eftirbátur, nú málið hevur rikist millum fleiri stýri. Herfyri fekk Fiskimálastýrið ábyrgdina av málinum. Eftir øllum at døma eru ikki allar súðir syftar, hóast ovasti embætismaðurin í Fiskimálastýrinum herfyri boðaði frá, at skipanin fór at virka frá 1. mars ella í seinasta lagi 1. apríl. Nú vit skriva 11. januar er málið enn ikki avgreitt. Eftir øllum at døma er ósemja um málið í Tinganesi. Ætlanin hjá Fiskimálastýrinum er at keypa telegrafstøðina til endamálið. Tað er hetta, sum støða skal takast til á fundinum í samgonguni í dag.

Útvarpið visti at siga í vikuni, at verður eingin MRCC-skipan klár 1. apríl verður eingin oljuboring í summar. Jørgen Niclasen sigur við ÚF, at hann vil ikki koma í ta støðu, at eitt uppskot hjá sær um eykajáttan til keyp av telegrafstøðini fer til atkvøðugreiðslu einaferð í februar og fellur, tí tá verður ov stutt skotbrá at finna eina aðra loysn. Hetta ljóðar skilagott. Um ikki landsstýrið megnar at finna eina semju um MRCC-støðina, so eru tó eisini aðrir møguleikar, antin at lata skotar taka sær av tilbúgvingini ella at lata Marinustøðina gera hetta. Men sum skilst dámar landsstýrinum lítið hesar møguleikar.

Landsstýrið má taka eina skilagóða avgerð skjótast. Tí vit kunnu ikki bjóða oljufeløgunum nakað, sum líkist hálvum ella ongum loysnum í hesum máli. Sjálvandi skulu feløgini innrætta seg eftir føroyskum viðurskiftum. Men soleiðis sum støðan er vorðin, so skapar hetta neyvan álit í oljuverðini á Føroyum sum framtíðar leitingarøki. Feløgini hava í samráð við okkara myndugleikar lagt sínar ætlanir eftir, at alt fór at verða klárt í ár. Verður ein "føroysk" loysn tí ikki funnin á samgongufundinum í dag, eigur landsstýrismaðurin í oljumálum at gera sítt til, at hansara starvsfelagar í Tinganesi lata donsku sjóverjuna taka sær av málinum, til føroyska loysnin verður klár einaferð.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Minningarorð um Martin Jákup Strøm

*føddur 30. august 1948 - deyður 18. desember 2000*

Tá eg fekk boðini um, at tú ikki longur var í millum okkum, runnu nógvir tankar fram fyri meg. Fyrst um alt tað, sum Strøm familjan hevur verið ígjøgnum, um persónar, sum hava verið ryktir frá okkum inn í ævinleikan. So aftur nú, nu vóru boðini efitr tær.

Og vit lesa í Sálma 139,16: »Sum fostur sóu eygu tíni meg, og í bók tíni stóðu teir allir upskrivaðir, dagarnir, ið ásettir vóru, áðrenn nakar av teimum enn var komin«.

Fyri eini 10 árum síðani kom eg at kenna teg. Vit vóru staddir inni í uppihaldsstovuni á Sjómansheiminum í Havn, vit bíðaðu eftir bussinum, eg á veg norð til Norðdepils og tú til Oyndarfjarðar, til bátin hjá tær, »Suðuroy«, sum lá har, gjørdur klárur til at fara á Norðhavið.

Tað var lætt at koma í prát við teg, áhugamál okkara vóru tey somu. Tosað varð um útróðrarleiðir, og um umstøðurnar hjá útróðrarmonnum.

Serliga kom eg tær uppá nær hond í 1995. Tá var ágangurin á útróðurin viðvíkjandi kvotum so harður, at flestu bátar niðan fyri 20 tons sigldu til Havnar at vísa sína misnøgd.

Serliga hugsi eg um tá dagatal skuldi leggjast á útróðrarbátarnar, tá gjørdist tú oddamaður fyri útróðrarmenninar í Føroyum, og ikki varð helmað í fyrrenn umstøðurnar hjá útróðrarmonnum aftur komu í ordan, hetta hava vit tær at takka fyri, so eisini eftirkomararnir kunnu halda fram í hesum stætti.

Tú var so sera røkin maður, hetta sást eina best á báti tínum, sum tú sjálvur hevði gjørt. Báturin var fiskibátur burturav, men eisini en lystyacht, altíð so reinur bæði innan og uttan. Man føldi seg, sum at koma inn í eina stovu, tá man fór umborð til tín at drekka kaffi. Eg var eisini umborð á trolaranum, tú sigldi við, einaferð tit lógu á Klaksvík, har var á sama hátt eitt sera nosligt



maskinrúm. Hetta lá alt so ræði fyri hjá tær, tí soleiðis vart tú av nátúr.

Síðani tá tosaðu vit altíð saman ofta tvær ferðir um mánaðin, seinast fjúrtan dagar áðrenn tú andaðist. Tú vart altíð hin sami frílynt maðurin hvussu so umstøðurnar vóru.

Føroyingar hava mist ein mann, ið vildi nakað vog serliga fyri tann meiniga mannin.

Hvat stendur so eftir, nú tá alt stríð er liðugt.

Tað er at hava vissa sær pláss heima há Gudi í ævinleikanum. Mangan tosaði tú um tað kvøldið í Havn, tá tú komst til hesa sannføring, at tað bert var við trúgv á Kristus, so áttu tú frið við Gud.

Orðatøkini 10,25 siga: »Tá ið stormurin kemur, er úti við hinum gudleysa, men hin rættvísi stendur á ævigari grund.«

Vit hava hjartans samkenslu við tykku, konu, børnum og systkjum og øllum sum stóðu tær nær.

Eina serliga heilsan tl mammuna, Louisu, sum hann var so hjartans góður við. Má Harrin geva tykkum ta styrki og troyst, sum skriftirnar geva. 2. Mósebók 23,20: »Eg sendi eingil undan tær, hann skal varða teg á ferðini og fylgja tær til staðið, ið Eg havi ætlað tær.«

Tøkk til tín, sum nýliga ert blivin skipari, og á veg frá kapellinum gav tú mammu Martin blómur og nøkur troystandi orð á ferðini. Má signing Guds fylgja tær.

Friður verið við minninum um Martin.

(av misgávum kom skeivt navn at standa undir minningarorðunum í týsdagsblaðnum. Umberið mistakið, blaðstj.)

**Vinur tín Essa**



*Bergur Hansen, djóralækni*



*Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur*



*Heri Kragesteen, sálarfrøðingur*



*Ingi Højgaard, løgfrøðingur*



*Jens Andreassen, lækni*



*Heri Joensen, prestur*



*Jón Klein Olsen, politistur*



*Jón Kragesteen. Ferðslutrygd*



*Julianna Næs, pedagogur*



*Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi*



*Turid Thomsen, lestrarvegleiðari*



*Marius Staksberg, málfrøðingur*

## Spyrjið serfrøðingarnar

Adressan: Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn, Fax 314720 ella teldupost: spyr@sosialurin.fo – og merkið, hvørjum tit seta spurningum.

**Svarini verða prentað í blaðnum mikudag**


## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu og sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, abbi, verfaðir og bróðir okkara

**Terje Dal Christiansen**

andaðist og varð jarðaður

*Í Havn 5. januar 2001*
**Sunnvá**



**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


# Verri úrslit hóast fleiri ferðafólk

**Bílagari ferðaseðlar og dýrari brennievni gera úrslitið hjá Atlantsflog í fjør verri enn árið fyri**



*Magni Arge er nøgdur við vøksturin í ferðafólkatalinum hjá føroyska flogfelagnum*

FLOGFERÐSLA
*Eyðun Klakstein*

Stóri vøksturin í flutninginum um flogvøllin í Vágum sæst eisini aftur hjá føroyska flogfelagnum.

Atlantsflog flutti í fjør 10 prosent fleiri ferðafólk á sínum farleiðum sammett við 1999.

Samlaða ferðafólkatalið fór úr 82.000 og upp í 91.000 í 2000.

– Hóast vit høvdu vónað ein enn størri vøkstur, eru vit nøgd við hendan vøksturin, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflog.

Men hóast nógv fleiri ferðafólk, merkir tað ikki størri avlop og fleiri pengar í kassan.

– Enn er ov tíðliga at siga, hvat úrslitið hjá felagnum verður. Vit rokna við verri úrsliti í fjør enn í 1999, men vit hava hóast tað avlop, sigur Magni Arge.



*Atlantsflog flutti 9.000 fleiri ferðafólk í 2000 enn árið fyri, men samstundis var stór prískapping, og oljuprísirnir tvífaldaðust*

### Hørð prískapping

Tað eru fleiri orsøkir til, at úrslitið hjá Atlantsflog verður verri í fjør enn árið fyri.

Brennievnið kostaði felagnum tvífalt so nógvar pengar sum árið fyri, og so hevur økta prískappingini eisini havt ávirkan.

– Í fjør fall miðalinntøkan fyri hvørt ferðafólk, tí kappingin um prísirnar var størri, enn hon plagar at verða, og útreiðslurnar av flúgvingini vóru samstundis størri, sigur Magni Arge.

Atlantsflog og Maersk høvdu stór prísátøk bæði um vári og um heysti, og hetta fekk eisini fleiri fólk at ferðast. Men prísinir vóru ikki teir somu, sum teir plaga at vera, og tí vóru hesi átøk ikki so gevandi, sum tey høvdu verið við vanligu prísunum.

### Skerja túratal

Atlantsflog legði eisini meira fyri á øðrum farleiðum, enn teirri mest nýttu millum Danmark og Føroyar. Atlantsflog gjørdi fleiri túrar til Noregs, Ísland og Skotland, og føroyska felagið byrjaði eisini at flúgva millum Aberdeen og Keypmannahavn.

Men í vetur hevur Atlantsflog aftur skert í túrunum á hesum farleiðum, tí grundarlag hevur ikki verið fyri meira flúgving, og serliga millum Aberdeen og Keypmannahavn hevur undirtøkan verið lítil.

– Vit eru eitt lítið felag, og tá vit flúgva millum teir útlendskar býir eru vit so evarska lítlir, at vit eru næstan ikki til staðar í Aberdeen, sigur Magni Arge.

### Fleiri prísátøk

At stór prískapping er á farleiðini millum Vágar og Keypmannahavn ger, at fólk ein fittan part av árinum kunnu ferðast munandi bíligari enn vanligt millum Føroyar og Danmark.

– Tann føroyski marknaðurin er ein avmarkaður marknaður, og nógva ferðingin millum Føroyar og Danmark ger, at vøksturin á leiðunum til Íslands, Noregs og Skotlands er minni, sigur Magni Arge.

Men hóast hetta skulu fólk rokna við, at Atlantsflog eisini í ár fer at hava onkur prísátøk. So leingi sum átøkini hava við sær fleiri ferðafólk, er meining í at halda fram við teimum.

– Enn hava vit ikki avgjørt, nær og hvussu hesi átøk verða, men mest upplagt er sjálvandi at gera okkurt í tí tíðini, tá ferðingin vanliga ikki er so nógv, sigur stjórin á Atlantsflog.

# Minni tíð til Prix-bólkarnar

**Tíðin til hvønn bólkin í innleiðandi kappingunum í Prix Føroyum verður skorin við 10 minuttum**

PRIX FØROYAR
*Eyðun Klakstein*

Ovurstóra luttøkan í Prix Føroyar tónleikakappingini hevur nú fingið fyrireikararnar at broyta kappingina.

Mest loyvda tíðin, sum bólkarnir hava at spæla í undir innleiðandi kappingunum, verður skorin úr hálvum tíma og niður í 20 minuttir.

Hetta verður gjørt fyri at innleiðandi umførini ikki skulu verða ov long.

Broytingin ger, at fyrireikararnir kunnu spara hálvan annan tíma í tíð, tá innleiðandi kappingarnar eru. Hetta tykist sum ein skilagóð avgerð, tí við 20 minuttum tekur meiri enn tríggjar tímar at fáa allar bólkarnar avgreiddar.



*Bólkarnir í Prix Føroyum sleppa at spæla í mesta lagi 20 minuttir í innleiðandi umførunum*

### Ov stór finala

Ein møguleiki hevði verið at gjørt ein innleiðandi umfar afturat, men hesum vóru fyrireikararnir ikki sinnaðir fyri.

– Tveir bólkar koma víðari frá hvørjum innleiðandi umfari, og høvdu vit skulu havt fimm innleiðandi umfør, høvdu vit fingið 10 bólkar í finaluna, og tað er helst ov mikið, sigur Fróði Vestergaard, sum er samskipari av Prix Føroyum.

– Hinvegin er mest loyva tíðin, sum bólkarnir spæla í finaluni í Prix Føroyum 15 minuttir, og tí halda vit, at tað ber væl til at skerja mest loyvdu tíðna í innleiðandi kappingunum niður í 20 minuttur.

Av hesum skal í minsta lagi eitt korter verða nýtt tilfar.

### Nógvir luttakarar

39 bólkar teknaðu seg til fjórðu Prix Føroyar kappingina, tá freistin var úti hósdagin í síðstu viku. Talan er um alskyns bólkar úr øllum landinum, og tað ber til at fáa eygað á bæði nýggjar og meiri royndar bólkar.

Fýra innleiðandi umfør verða áðrenn stóru finaluna í Norðurlandahúsinum, sum verður útvarpað og sjónvarpað.

Fyrsta umfarið verður í Vági 27. januar. Síðani verður kappast á Strondum 3. februar, í Klaksvík 23. februar og í Miðvági 3. mars. Finalan verður í Havn 21. apríl.

Nú leggja fyrireikararnir innleiðandi umførini til rættis, og tað er ein størri uppgáva. Bólkarnir skulu býtast nøkunlunda javnt út á fýra umfør, og nógv viðurskifti eru at taka fyrilit fyri.